

Stjórin í Statoil saman við føroyska Statoilstjóranum. Mynd Jógvan Hugo

# Statoil keypir upp

**Jan Müller**

11.12.2015 - 17:45

Oljan.fo

Sjálvt um oljuprísurin er lágur, so eru tað nøkur av teimum størru oljufeløgunum, sum keypa upp í løtuni. Í morgun frættist, at Statoil hevur keypt upp í Norra, Bretlandi, USA og Brasil. Handlarnir eru gjørdir við felagið Repsol, sum eisini hevur keypt okkurt øki frá Statoil.

Eingin ivi tykist verða um, at nú oljuprísurin er lágur, so nýta nøkur av teimum størru peningasterku feløgunum møguleikan til at keypa á einum marknaði, har prísirnir eru sera lágir. Greinararnir eru tó ósamdir um, hvønn veg prísurin fer at fara í nærmastu framtíð.